## Ásetingar fyri Sethúsaøkið á Hamarsvegi

**Sethúsaøkið við nýggju útsykkingina við ´´Hestheiðar´´.**

Hesar ásetingar hava til endamáls at skipa útstykkingina til sethús. Økið, sum er ústykkjað, fevnir um 17 grundstykkir til sethús, 2 grøn økir, umframt veg og gonguteig.

Fyri viðurskifti, sum ikki eru skipað í hesum ásetingum, er almenna byggisamtyktin hjá Skopunar kommunu galdandi.

### § 1 ENDAMÁL

1.1 At tryggja, at skipanin av økinum verður sum sýnt í kortskjali 1, 2 og 3.

### § 2 BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

2.1 Øll bygging á Hamarsvegi skal gerast í samráð við byggivaldið.

2.2 Mest loyvda byggistig er 0,3. Grundøkir, sum eru i øki 3 og 4 kunnu leggja 0,1 afturat.

2.3 Mest loyvda nýstlustig er 0,8.

2.4 Mest loyvdu hæddir eru fylgjandi:

**Øki 1** Hús við vanligari mønureising, mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt á útveggi og 9 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki, mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli, kunnu í mesta lagi vera 6 m á lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 7,5 m.

**Øki 2** Hús við vanligari mønureising, mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt á útveggi og 7,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki, mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli, kunnu í mesta lagi vera 6 m á lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 7,5 m.

**Øki 3** Hús við vanligari mønureising, mugu ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt á útveggi og 6 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki, mugu ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli, kunnu í mesta lagi vera 4,5 m á lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 6 m.

**Øki 4** Hús við vanligari mønureising, mugu ikki vera hægri enn 3,5 m til hægsta punkt á útveggi og 5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki, mugu ikki vera hægri enn 3.5 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli, kunnu í mesta lagi vera 3,5 m á lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 5 m.

2.5 Loyvt er at byggja kvist á báðum síðum, tó í mesta lagi helvtina av longdini av húsinum. Um kvistar verða bygdir á báðum síðum, skulu hesir so vítt gjørligt vera symmetriskir. Kvistur skal sum útgangstøði byggjast frá miðjuni av húsinum og vaksa úteftir. Hetta punkt er galdandi fyri øki 1,2 og 3.

2.6 Frástøða frá grannamarki skal vera sum víst á tekning. T.v.s. 5 m frá innkoyring og 2,5 m frá marki. Tó kann byggivaldið, tá ið talan er um minni týðandi veg, ella tá ið lendið ikki loyvir tí, geva loyvi til, at frástøðan kann vera sett nærri vegi.

2.7 Loyvt er at økja um byggi- og nýtslustigið við 0,1, tó í mesta lagi 50 m2, sum bert kann nýtast til bilhús, bilskýli, úthús, yvirdekkað øki og líknandi.

## § 3 VEGIR, GARÐAR OG PARKERINGSPLÁSS

3.1 Innkoyringar á grundøkini skulu gerast sambært kortskjali 2.

3.2 Nóg stórt øki skal vera sett av til parkeringspláss á grundøkinum. Hetta fyri at tryggja, at íbúgvar og vitjandi fáa sett akfarið frá sær á økinum. Pláss skal vera til í minsta lagi tveir bilar til hvørt grundøki. Eru tveir bústaðir í einum sethúsi, skal pláss vera fyri í minsta lagi tveimum parkeringsplássum til hvønn bústað.

3.3 Tað er ábyrgd eigarans, at kantsteinar, vegristir og asfalt í økinum ikki fáa skaða undir byggingini. Um skaði verður gjørdur, verður hetta umvælt av kommununi uppá eigarans rokning.

3.4 Við vegsamankomingar og innkoyringar á grundøkir verða ásett útsýnisøki. Innan fyri hetta má eingin lutur av lendi, bygningi, girðing ella vøkstri verða hægri enn 1 m yvir hæddarstigið á vegmiðjuni framman fyri grundøkinum, sum talan er um. Byggimyndugleiki ásetur støðd/vídd av úsýnisøki.

## § 4 BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

4.1 Byggimyndugleika og átalurætt hevur Skopunar kommuna.

4.2 Byggivaldið kann geva loyvi til smávegis/léttari broytingar frá hesum ásetingum, um so er, at dámurin/útsjóndin á økinum, sum ásetingarnar royna at skapa ella varðveita, ikki verða broyttar av teirri orsøk.

Kortskjal 1.



Kortskjal 2.


502c
502d
502e
502f
502g
502h
502i
502k
502l
502a
502m
502n
502o
502p
502q
502r
502s
502t


Vidd 536m²
Vidd 537m²
Vidd 526 5m²
Vidd 487m²
Vidd 488m²
Vidd 487m²
Vidd 441 5m²
Vidd 452m²
Vidd 460m²
Vidd 423m²
Skurður B
Skurður B
Skurður A
Skurður C
Skurður A
Innkoyring á grundøki
Nýggj gongbreyt
Breidd 1m.




*Kortskjal 3 – Skurður A,B og C*